# FCK vann DM við tapi

FC Keypmannahavn tapti í gjár útidystin ímóti OB, men hóast tapið gjørdust teir danskir meistarar. Orsøkin til tað var, at AC Horsens vann dystin ímóti Brøndby, og nú kann Brøndby ikki fáa FCK aftur í stríðnum um danska meistaraheitið. Bert eitt mál kom í dystinum í Odense, og tað skoraði Jose Junior fyri OB. Harvið heldur OB fast um bronsuplássið í superliguni, meðan FCK er meistari fyri fimtu ferð í søguni hjá felagnum.



# Stabæk stílar høgt

Í seinasta kappingarári tók Start øll á ból í norsku tippuliguni. Felagið kom úr næstbestu deildini og setti beina kós í oddin í bestu deildini. Í ár er eitt annað felag við at gera Start kynstrið eftir í Noregi. Stabæk flutti upp í tippuliguna í fjør, og eftir fyrstu seks umførini liggur Stabæk sum nummar trý í deildini. Og tá spældi liðið javnleik á útvølli ímóti oddaliðnum Brann sunnudagin. Stórfeløgini Vålerenga og Rosenborg hava ikki fingið ta byrjan í norsku kappingini, sum roknað varð við. Tey liggja ávíkavist nummar 9 og 10 í deildini.



*framrættaðu spælarunum hjá EB/Streymi. Men oddaliðið megnaði kortini tvær ferðir at javna – og harvið halda fast um oddasessin*
*Mynd: Álvur*

árstalsfelagnum, men tað gjørdi tað tó ikki. Restina av hálvleikinum hildu teir á við ágrýtna spælinum, og í seinasta minuttinum undan steðginum fingu teir eisini løn fyri stríðið. Tað tóktist vera ivasamt, hvør vildi taka ábyrgdina á seg, tá Hanus Thorleifsson varð feldur í brotsteiginum. At enda gekk Mikkjal tó fram at bóltinum, og uttan nakað suim helst hóvasták hamraði hann í besta Lerby-stíli bóltin í meskarnar.

### Heimamenninir iðraðu seg

Við leiðsluni var væntandi, at B36 fór at liggja dúpri eftir steðgin, soleiðis at teir kundu gera sær dælt av eyðkenda kontra-vápninum, sum EB/Streymur plagar at duga so væl.

Tað spældi tó ongan tíð soleiðis av, at gestirnir satsaðu alt í royndini eftir einum útjavnandi máli. Men tað eydnaðist teimum spakuliga at skapa eitt miðvíst trýst móti B36, og einstakar vandastøður íkomu eisini.

### Hálvbíligt

Og tað eydnaðist teimum so eisini at enda at fáa útjavnandi málið. Talan var tó um hálvbíligt brotsspark. Mikkjal Thomassen hevði vunnið bóltin í verjustøðu, og skuldi júst til at sparka burtur. Ronnie Samuelsen fekk tó prikað bóltin undan honum, og hóast Mikkjal helt aftur í sparkinum, so datt Ronnie um fótin.

Brotssparkið sendi Egil á Bø trygt í kassan, og so varð lagt upp til eina sera spennandi finalu. Ikki minst, tá Mikkjal Thomassen dekan ov óneyðugt fekk sítt seinna gula kort, tá dómarin ikki vildi hoyra fleiri viðmerkingar um dømingina. Men talan gjørdist tó ongantíð um nakað veruligt trýst móti B36-málinum kortini. Spælið gekk eins nógv hinvegin, og tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð, mundi talan hóast alt vera um eitt hampuliga rættvíst úrslit. Skuldi nakar vinnari verið, so skuldu tað helst verið teir á heimaliðnum, men teir megnaðu ikki at gera arbeiðið liðugt. Og ein gamal æviga galdandi lærdómur er jú eisini, at tey keðiligu málini telja eins nógv, sum tey uppibornu…

**STUTT SAGT**



## Tungt á størri vølli

Soleiðis sum úrslitini kring landið lagaðu seg, so helt EB/Streymur fast um oddasessin við javnleikinum í Havn. Einum javnleiki, sum teir heldur ikki vóru so øgiliga ónøgdir við.

– Tað er altíð tungt at spæla í Havn. Vit eru ikki vanir við, at vøllurin er somikið stórur, og tí kann tað gerast nakað langt millum keturnar. Nakað sum heldur ikki gjørdist betri, tá vit – serliga fyri steðgin – sparka rættiliga nógv, helt Ronnie Samuelsen eftir dystin.

– Eftir steðgin haldi eg tó, at vit fáa tað spælið fram, sum vit eiga at sýna, og tá gekst okkum munandi betri. Og tað er í øllum førum flott av okkum, at vit koma í dystin aftur tvær ferðir, tá B36 annars er á odda.

Onkur hjá B36 hevði hug at ilskast um brotssparkið, sum tú vann. Var talan um brotsspark?

– Eg prikið bóltin undan Mikkjal, beint áðrenn hann skjýtur, og har var eisini kontakt. Tað kann vera, at eg hjálpi nakað til, men nú havi eg spælt fótbólt í somikið nógv ár, at eg detti, um onkur tekur beinini á mær í brotsteiginum.

**-mørk**